Almannamálaráðið

Løgtingið

Dagfesting: 02. november 2020
Mál nr.: 20/00828
Málsviðgjørt: BÁT
Eftirkannað: 5. oktober 2020

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum (Broyting í heitinum, innsetan av veitingum og tekniskar broytingar)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum
(Broyting í heitinum, innsetan av veitingum og tekniskar broytingar)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 145 frá 13. desember 2019, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

"**Løgtingslóg um áseting av almannaveitingum**"

2. § 1 verður orðað soleiðis:

"**§ 1.** Henda lóg um áseting av almannaveitingum er givin út sambært § 1, stk. 2, nr. 2 og 7 í ríkislóg nr. 315 frá 17. mai 1995 "om sociale ydelser på Færøerne"."

3. § 2, 1. pkt. verður orðað soleiðis: "Almannaveitingar sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a., løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjonistar v.fl., løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl., løgtingslóg um almannatrygd og tænastur og løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk verða árliga javnaðar sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar."

4. Í § 3 verða sum nr. 4 og 5 sett:

"4) Løgtingslóg um almannatrygd og tænastur:

	Byrjanarár	Kr.
Hægsta uppihalds-veiting	2021	18.552 (mánaðarliga)

5) Løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk:

	Byrjanarár	Kr.
Hægsta uppihalds-veiting	2021	18.552 (mánaðarliga)

"

5. Í § 4, stk. 1-4 verður “forsorgarlógini” broytt til: “løgtingslóg um almannatrygd og tænastur”.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað fyri útgjald av veitingum frá og við januar 2021.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Við løgtingslóg nr. 64 frá 30. apríl 2018 hevur Løgtingið samtykt, at almannaveitingar frameftir verða javnaðar sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar. Neyðugt er tí at konsekvensbroyta løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum.

Við løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 hevur Løgtingið samtykt, at uppihaldsveitingar eftir lógini um almannatrygd og tænastur verða ásettar sum ein prosentpartur av hægstu uppihaldsveiting. Lógin um almannatrygd og tænastur ásetir, at hægsta uppihaldsveiting er ásett í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum. Eisini er uppskot lagt fyri Løgtingið um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum hevur við sær, at uppihaldsveitingar verða ásettar sum prosentpartur av hægstu uppihaldsveiting.

Neyðugt er tí at konsekvensbroyta løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum og áseta hægstu uppihaldsveiting í lógina.

Harumframt er talan um aðrar tekniskar broytingar, sum avleiðing av løgtingslóg nr. 64 frá 30. apríl 2018 um javningarprosent til almannaveitingar.

1.2. Galdandi lóggáva

Flestu almannaveitingar hava verið javnaðar sambært løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum. Javningarprosentið var ásett í lógini og var annars ikki tengt at objektivum kriterium so sum prís- ella lønarvøkstri. Tað merkir, at javningarprosentið varð ásett politiskt. Javningarprosentið hevur síðani 2014 verið 0.

Nú løgtingslógin um javningarprosent til almannaveitingar er sett í gildi, er endamálið við løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum broytt, tí javningin er flutt frá løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum til løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar. Tí verður neyðugt at strika orðið “javning” í heitinum á lógini.

Uppihaldsveitingar sambært forsorgarlógini og uppihaldsveitingar sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk hava verið javnaðar sambært hækking í lønarsáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Veitingarnar hava verið ásettar sum ein prosentpartur av hægstu dagpeningaveiting sambært løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. (frítíðarløn ikki íroknað). Um lønin t.d. hækkar 2,5 prosent, tá hækkar veitingin eisini 2,5 prosent.

Í sambandi við at løgtingslóg um almannatrygd og tænastur kemur í gildi 1. januar 2021, samstundis sum forsorgarlógin verður sett úr gildi, er javningin av uppihaldsveitingum broytt, soleiðis at tær verða javnaðar á sama hátt sum aðrar almannaveitingar (løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020). Í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur er ásett, at uppihaldsveiting verður ásett sum ein prosentpartur av hægstu uppihaldsveiting. Í løgtingslógini er somuleiðis ásett, at hægsta uppihaldsveiting er ásett í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum. Við øðrum orðum í staðin fyri at vísa til dagpeningaupphædd sbrt. løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m., verður nú víst til hægstu uppihaldsveiting sambært løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum. Hægsta uppihaldsveiting verður ásett til somu upphædd sum dagpeningaupphæddin, og tí hevur broytingin ikki ávirkan á støddina á veitingini.

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk er lagt fyri Løgtingið við tí endamáli, at javningin av uppihaldsveitingum í sambandi við arbeiðsfremjandi tiltøk verður gjørd á sama hátt sum í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur (sí omanfyri). Sostatt er neyðugt at konsekvensbroyta løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið er at tillaga løgtingslógina um áseting og javning av almannaveitingum, soleiðis at hon er í samsvari við løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar og løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Endamálið er at fáa hægstu uppihaldsveiting ásetta, soleiðis sum ásett er í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, og sum ætlanin er við uppskoti til broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. Hægsta uppihaldsveiting verður ásett til somu upphædd sum dagpeningaupphæddin. Broytingin hevur sostatt ikki við sær broyting í støddini á veitingunum, sum verða veittar sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur og løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Talan er um konsekvensbroytingar og innsetan av hægstu uppihaldsveiting.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Av tí at talan er um tekniskar broytingar, hevur uppskotið bert verið til ummælis hjá Almannaverkinum. Tey høvdu ongar viðmerkingar til uppskotið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
At almannaveitingar skulu javnast sbrt. løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar er samtykt við løgtingslóg nr. 64 frá 30. apríl 2018. At uppihaldsveitingar sbrt. løgtingslóg um almannatrygd og tænastur eru ásettar sum prosentpartur av hægstu uppihaldsveiting, sum verður ásett í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum, er samtykt við løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020. Við hesum uppskoti verður løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum konsekvensbroytt í mun til omanfyrinevndu lógir, og hevur hetta uppskotið sostatt ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Hetta uppskotið er ein konsekvensbroyting í sambandi við aðra lóggávu, og hetta uppskotið hevur tí ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki markaforðingar við sær.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Í løgtingslóg nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 145 frá 13. desember 2019, verða gjørdar hesar broytingar:

Nr. 1 Heitið á løgtingslógini verður broytt, soleiðis at javning verður strikað úr heitinum.

Nr. 2 (§ 2, 1. pkt.)
Løgtingslóg um almannatrygd og tænastur og løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk verða lagdar afturat teimum lógunum, hvørs veitingar verða javnaðar sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar.

Higartil hevur tað verið soleiðis, at uppihaldsveitingar sbrt. løgtingslóg um almannatrygd og tænastur og løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk hava verið tengdar at hægstu dagpeningaveiting. Tað vil siga, at tá hægsta dagpeningaveiting hækkar, tá hækkar uppihaldsveitingin samsvarandi. Frameftir verða uppihaldsveitingarnar tengdar at hægstu uppihaldsveiting, sum verður ásett í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveiting. Hægsta dagpeningaveiting hækkar sambært samráðing millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Hægsta uppihaldsveiting hækkar sbrt. løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar. Javningarprosentið verður roknað sum eitt miðaltal av prosentvísu broytingini í lønarkarminum hjá Fíggjarmálaráðnum og prosentvísu broytingini í brúkaraprístalinum.

Nr. 3 (§ 3, nr. 4 og 5)
Upphæddin fyri hægstu uppihaldsveiting, sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur og løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, verður sett inn í lógina.

Nr. 4 (§ 4)
Frameftir er tað løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, sum skal nýtast, og tí verður heitið "forsorgarlógin" broytt til "løgtingslóg um almannatrygd og tænastur".

Til § 2
Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað fyri útgjald av veitingum frá og við januar 2021.

Almannamálaráðið, 02. november 2020

Elsebeth M. Gunnleygsdóttur
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Almannaverkinum